# atfinnandi viðmerkingar

tríbýti av valdi? Hetta er ein ógvuliga áhugaverdur og viðkomandi spurningur. Er tað víst, at umtalaða valdsbýti er besta ella einasta trygd fyri politiskum stabiliteti, rættindatrygd og ágangi frá almennu myndugleikunum?

**Finnast betri skipanir?**
Tað tykist ofta, at nógv fólk eru komin til ta niðurstøðu, at menniskjað hevur funnið ta frægastu loysnina í sambandi við at skapa eina politiska skipan, har stjórnin á góðan og virðiligan hátt stjórnar fólkinum, forpliktar seg at hava tamarhald á sær sjálvari og tryggjar borgarunum grundleggjandi rættindi og politiskan stabilitet. Finnast ikki betri loysnir enn tær, sum nú á døgum verða mettar at vera tær bestu? Tað tykist løgið, at tað næstan ongantíð verður ført fram, at betri loysnir munnu finnast. Tá ið ein hevur í huga tað bjartskygnið og ta framburðartrúgv, sum hava verið grundarlag fyri menningini í framkomna og modernaða heiminum, er trupult at skilja, hví framburðartrúgvin ikki eisini kann flytast yvir til politiskt-vísindaliga økið og seta spurningar við verandi skipanir, sum ofta virka illa, og geva boð uppá, hvussu betri skipanir kunnu mennast. Tað eru ikki fullkomnar loysnir, sum her verða eftirspurdar, tí tær finnast neyvan. Tað er viljin at royna at skapa betri loysnir, ið ein sóknast eftir.

**Fyrisitingarstaturin – tað fjórða valdið?**
Eitt menningareyðkenni í modernaða heiminum er sokallaði fyrisitingarstaturin (administrative state). Embætisveldi hevur verið partur av skipan okkara í longri tíð, so tað er ikki embætisveldi í sjálvum sær, ið er eitt nýtt eyðkenni; tað er støddin, kompleksiteturin, mannagongdir, reglugerðir o.sfr., sum geva embætisveldinum eina serstaka støðu í teirri politisku skipanini. Embætisveldið er í stóran mun sjálvstøðugt í skipanini, og eftirlitið við embætisveldinum er ofta vánaligt. Teir politisku leiðararnir (ráðharrarnir) hava ofta í veruleikanum lítla stýring á fyrisitingini. Eisini er ávirkanin hjá fyrisitingarstatinum á einstøku borgararnar vorðin nógv størri nú á døgum í mun til fyrr. Valdið hjá fyrisitingarstatinum er rættiliga stórt, og harvið er eisini størri vandi fyri valdsmisnýtslu. Henda støða kann lættliga seta borgararættindi í vanda. Leikluturin og valdið hjá fyrisitingarstatinum hevur týdning fyri siðbundnu fatanina av valdstríbýtinum. Um hetta sigur M. J. C. Vile í bókini Constitutionalism and the Separation of Powers:

"The reality of the working of government provides a difficulty for the traditional theory of the separation of powers, which divides the powers and functions of government into three, for, in effect, there are now four major sections of the political institutions of the democratic state: the legislature, the government, the administrative machine, and the judiciary."

Tað er ikki longur nøktandi at siga, at valdið er býtt í tríggjar partar. Fyrisitingarveldið (embætisveldið) hevur ment seg til at blíva eitt slag av valdi í mun til tey trý siðbundnu væaldini. Fyrisitingin er vorðið tað fjórða valdið, so valdsbýti er: útinnandi vald, løggevandi vald, dømandi vald og fyrisitandi vald. Hetta fýrabýti av valdi krevur eina endurskoðan av teirri politisku skipanini. Tørvur er á at menna eftirlitsmekanismur, sum kunnu fyribyrgja valdsmisnýtslu hjá øllum fýra væaldunum. Eins og ætlanin við valdstríbýtinum (og eftirlits- og javnvágskipanini, checks and balances á enskum) er at forða fyri ágangi á borgarlig rættindi, eigur ein endurskoðað skipan at innihalda eftirlitsmekanismur, sum á effektivan hátt forða fyri, at embætisfólk fremja valdsmisnýtslu og ágang ímóti rættindum borgaranna.

Tann vanliga og siðbundna fatanin av valdstríbýtinum hevur tørv á atfinningum og endurskoðan. Hetta eigur sjálvandi at verða gjørt í virðing fyri øllum undanfarnum politiskum heimspekingum, sum hava roynt at víst á, hvussu frælsistryggjandi og góðar stjórnarskipanir kunnu skipast.

**Útvaldar keldur:**


*Alexander, Larry (ritstjóri): Constitutionalism. Philosophical Foundations. Cambridge University Press, Cambridge 2001.*

*Barber, Sotirios A. Og Robert P. George: Constitutional Politics. Essays on Constitution Making, Maintenance, and Change. Princeton University Press, Princeton 2001.*

*ButleRitchie, David T.: The Confines of Modern Constitutionalism. Pierce Law Review, vol. 3, no. 1, s. 1-32, 2004.*

*Diskin, Abraham o.o.: Why Democracies Collapse: The Reasons for Democratic Failure and Success. International Political Science Review, vol. 26, no. 3, s. 291-309, Sage Publications, London 2005.*

*Lane, Jan.Erik: Constitutions and PoliticalTheory. Manchester University Press, Manchester 1996.*

*Locke, John: Anden afhandling om styreformen. Det lille Forlag, Frederiksberg 1996.*

*Madison, James o.a.: The Federalist Papers. Mentor, a division of Penguin Putnam Inc., New York 1999.*

*March, James G. Og Johan P. Olsen: Rediscovering Institutions. The Organizational Basis of Politics. The Free Press, New York 1989.*

*Montesquieu, Charles Louis de Secondat de: Om lovenes ånd. Bind I og II. Gads Forlag, Keypmannahavn 1998.*

*Olsen, Henrik Palmer: Magtfordeling og mistillid. Greinin stendur í Grundlovens nutid og fremtid. Årsberetning 1998. Retsvidenskabeligt Institut B, Københavns universitet.*

*Olsen, Henrik Palmer: Magtfordeling. En analyse af magtfordelingslæren med særlig henblik på den lovgivende magt. Jurist- og Økonomforbundets Forlag, Keypmannahavn 2005.*

*Peters, Guy B.: Institutional Theory in Political Science. The "New Institutionalism". Continuum, New York, 2001.*

*Rasmussen, Rúni: Valdsbýti. Føroyskt Lógarrit (FLR), vol. 5, no. 1, Tórshavn 2005.*

*Rasmussen, Rúni: Konstitutionalisma og stjórnarskipanir. Føroyskt Lógarrit (FLR), vol. 6, no. 1, Tórshavn 2006.*

*Vile, M.J.C.: Constitutionalism and the Separation of Powers. Liberty Fund, 2. útgáva, Indianapolis 1998.*


## Fakta: Valdsbýti

Enski heimspekingurin John Locke (1632-1704) legði grundarlag fyri tríbýtinum av valdinum, tí hann hann greitt vísti á týdningin av at býta sundur løggevandi og útinnandi valdið fyri at forða valdsmisnýtslu. Serliga í Second Treatise of Civil Government verða hugsanirnar hjá Locke um sambandið millum ymisku væaldini lýst.

Franski løgfrøðingurin Charles de Montesquieu (1689-1755) orðað væl kenda tríbýtið av valdinum í verkinum De l'Esprit des Lois (Um anda lóganna) frá 1748. Tó hevur hann ikki uppfunnið læruna um valdsbýtið. Locke vísti á týdningin av at løggevandi og dømandi vald eiga at vera býtt sundur. Montesquieu leggur dømandi valdið aftur at valdstvíbýtinum hjá Locke og orðar tríbýttu valdslæruna. Men valdsbýtislæran er ikki eitt einstaklingaavrik. Fjølbroyttar søguligar royndir og ymiskir politiskir heimspekingar hava víst á, at neyðugt er, sambært teimum, at valdið verður býtt til tess at forða fyri valdsmisnýtslu.

Ofta verður sipað til ta amerikonsku stjórnarskipanina í sambandi við valdsbýti. Teir amerikonsku stjórnarski panarsmiðirnir vóru í stóran mun ávirkaðir av teimum politisku hugsanunum hjá Locke og Montesquieu. Stjórnarskipanarsmiðir í mongum londum hava fingið íblástur frá Locke, Montesquieu og teimum amerikonsku stjó rnarskipanarsmiðunum, bæði í sambandi við tingræðisskipan og forsetaskipan.

Munur er á valdsbýti millum útinnandi og løggevandi vald í ávikavist tingræðisskipan og forsetaskipan. Tað er ikki talan um veruligt valdsbýti millum løggevandi og útinnandi vald í skipan við tingræði, tí stjórnin (samgongan) hevur bæði tað løggevandi og útinnandi valdið. Harafturímóti er hetta býti veruligt í forsetaskipan, tí bæði løggevandi og útinnandi væaldini eru vald hvør sær beinleiðis av fólkinum. Tað besta dømið um slíka skipan er tann amerikanska politiska skipanin. Fólkið velur umboð til Kongressina (Umboðsmannatingið og Senatið), sum er løggávuvald, og forsetin (útinnandi vald) verður eisini valdur av fólkinum